# Torbjørn Jacobsen hevur spolerað alt

*– Spurningurin er um veruliga endamálið er at beina fyri útbúgvingini av heimahjálpum, sigur Ása Olsen, forkvinna í heimahjálaparafelagnum*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Vit hava stríðst fyri hesum skúlanum í fimm ár.

– Og nú skúlin skal flytast til Suðuroyar, eri eg bangin fyri, at hann aftur hesuferð dettur niðurfyri.

Tað kom dátt við hjá forkvinnuni í Heimahjálparafelag Føroya at frætta, at landsstýrismaðurin í skúlamálum hevði gjørt av at flyta almanna- og heilsuskúlan suður á Tvøroyri.

Annars var ætlanin at skúlan skuldi vera í Havn, og hann skuldi byrja 1. januar.

Hann skuldi vera ein deild av Sjúkrasystraskúlanum og farið varð undir fyrireikingarnar, nú Torbjørn Jacobsen brádliga gjørdi av, at skúlin skal vera á Tvøroyri ístaðin.

Á skúlanum skuldu tríggjar útbúgvingar vera.

Tann stytsta útbúgvingin skuldi vera ein útbúgving fyri heimahjálparar.

Hetta var ein útbúgving, sum skuldi taka seks mánaðir.

Afturat hesum, skuldi skúlin eisini útbúgva almanna og heilsuhjálparar og almanna og heilsurøktarar og tær útbúgvingarnar skuldi taka eitt og hálvtannað ár.

Og útbúvingin, sum heimahjálparafelagið hevur størstan áhuga í, er sjálvsagt útbúgvingin av heimahjálpum.

Ása Olsen, forkvinna í heimahjálparafelagnum, sigur, at tað hevur verið sera stórur tørvur á hesi útbúgvingini av heimahjálpum.

– Hetta er ein útbúgving, sum vit hava stríðst fyri síðani í 1995.

– Tað hevur fleiri ferðir verið upp á tal at byrja skúlan men tað hevur verið útsett hvørja ferð.

– Og nú ætlanin loksins var, at skúlin skuldi byrja 1. januar, heldur Ása Olsen, at hann hevði heldur ikki komið nú, um heimahjálparafelagið ikki hevði strongt so hart á.

Men nú tað er avgjørt at flyta skúlan suður á Tvøroyri, stúrir forkvinnan í heimahjálparafelagnum, fyri, at útbúgvingin fer at detta niðurfyri einaferð afturat.

–Og kanska verður hetta enntá mønustingurin hjá hesi útbúgvingini, heldur hon.

**Spolerað alt**

Ása Olsen sigur, at tað er ein spurningur um Torbjørn Jacobsen hevur hugsað seg nóg væl um, tá ið hann gjørdi av at flyta skúlan í Suðuroynni.

– Ella hinvegin er spurningurin nettupp, um hann ikki hevur hugsað seg sera væl um, og at tað veruliga endamálið júst er, at útbúgvingin skal detta niðurfyri.

– Okkurt má búgva undir, tá ið ein landsstýrismaðurtekur tekur eina so týdningarmikla avgerð eftir eina viku í starvinum.

– Tað, sum vit nú spyrja okkum er, um talan ikki alla tíðina hevur verið at blása okkum tórvmold í eyguni, tá ið skúlin brádliga verður fluttur, aftaná at tað er søkt eftir skúlastjóra og deildarleiðara.

Ása Olsen sigur, at heimahjálpirnar, sum skulu undir útbúgving, eru ikki ungdómar, men tilkomnar konur við húsi, manni og børnum

– Og at koyra tær suður á Tvøroyri í skúla er so tvørligt, at tað fer neyvan at bera til, tí í Suðuroy verða tær noyddar at leiga sær hús.



*– Vit fara ikki at sita hendur í favn ímeðan Torbjørn Jacobsen koyrir alt fyri bakka, sigur Ása Olsen, sum er forkvinna í Heimahjálparafelag Føroya*

– Var skúlin í Havn, hevði tað ikki verið neyðugt fyri tær allarflestu heimahjálpirnar.

– Eg dugi heldur ikki at síggja, hvussu tað ber til at hava stjóra í Havn fyri einum skúla á Tvøroyri.

– At leggja skúlan í Suðuroy er tí næstan tað sama sum at geva honum mønustingin.

– Við avgerðini at flyta skúlan, hevur Torbjørn Jacobsen spolerað alt, tí hetta er at taka grundarlagið undan útbúgvingini av heimahjálpum.

Men Ása Olsen vissar um, at Heimahjálparafelagið fer ikki at sita hendur í favn ímeðan øll útbúgvingin verður koyr fyri bakka.

Hon sigur, at nevndin í felagnum fer nú at taka málið upp. Ætlanin er eisini at taka upp samband við landsstýrismannin fyri at vita, hvat hann ætlar við útbúgvingini.

# Hetta hóvar mær illa

*– Avgerðin at flyta almanna heilsuskúlin til Suðuroyar, er ørkymlandi, heldur Joan Ziskason, forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya*

ÁKI BERTHOLDSEN

– At almanna- og heilsuskúlin brádliga er fluttur til Suðuroyar, avdúkar, hvussu lítið skil er í.

Tað heldur Joan Ziskason, forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya.

Eisini hon varð tikin á bóli, tá ið Torbjørn Jacobsem, óvæntað kunngjørdi, at hann hevði gjørt av, at flyta almanna og heilsuskúlan úr Havn, og suður á Tvøroyri.

Hon sigur, at tað er ørkymlandi, tá ið politiski myndugleikin arbeiðir á hendan hátt, og hon heldur, at hetta vísir, hvussu lítið skil er í.

–Skuldi tað hent, at tað aftur kemur ein nýggjur landsstýrismaður í skúlamálum, kunnu vit so vænta, at skúlin verður fluttur einaferð afturat.

–Soleiðis ber ikki til at arbeiða, heldur Joan Ziskason.

**Nógvar spurningar**

Joan Ziskason sigur, at avgerðin um at flyta skúlan, reisir nógvar spurningar, sum hon væntar at Sjúkrasystrafelagið vil hava greiði á.

Sjúkrasystrafelagið hevur ikki viðgjørt støðuna.



*– Verður skúlin fluttur, kann tað vera, at vit koma til ta niðurstøðu, at vit hava samráðst við landsstýrið undir skeivum fortreytum, sigur Joan Ziskason, forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya*

Men hon væntar, at felagið fer uttan iva at umrøða málið og hon væntar eisini at tey fara at royna at fáa fund við landsstýrismannin fyri at vita, hvat hann ætlar.

Men hon vísir á, at tað er ikki vist, at Sjúkrasystrafelagið fer at góðtaka tað uttan víðari, at skúlin veðrur fluttur.

– Vit hava brúkt tíð uppá at samráðast við fíggjarmálastýrið um lønarviðurskiftini hjá teimum, sum skulu manna leiðsluna í nýggja skúlanum.

– Avgjørt varð, at sjúkrasystraskúlin og og almanna og heilsuskúlin skuldi leggjast saman. Og skúlarnir skuldu vera í Havn.

– Søkt hevur verið eftir skúlastjóra, umframt einum deildarleiðara til sjúkrasystraskúlan og einum til almanna- og heilsuskúlan.

Men Joan Ziskason sigur, at tey hava gjørt avtalu um starvsviðurskiftini hjá hesum fólkum útfrá teirri fortreyt, at skúlin skuldi vera í Havn.

–Men nú hann er fluttur, er tað ein spurningur, um vit ikki hava gjørt avtaluna útfrá skeivum fortreytum, tí tað er munur á, at arbeiða í Havn og at arbeiða á Tvøroyri.

–Eitt nú er tað ein spurningur um fakliga grundarlagið er í lagi á Tvøroyri, sigur hon.

Hon vísir m.a. til, at sjúkrasystraskúlin er í Havn og har er bókasavnið, útgerðin og tøknin til skúlan.

– Skal skúlin leggjast á Tvøroyri mugu tey viðurskiftini koma í rættlag.

Hon sigur, at hon sat sjálvt í nevndini, sum gjørdi tilmæli um, hvar skúlin skuldi vera.

– Vit kannaðu málið rættiliga gjølla, men tað varð ongin ivi um, at skúlin skuldi vera í Havn, tí har var tað rætta umhvørvi til hann og har verður raksturin bíligari, sigur Joan Ziskason.

Hon heldur eisini, at tað skúlin fer at liggja óhøgliga fyri á Tvøroyri, tí talan er um tilkomið fólk, sum gongur á hann og tað kann verða trupult hjá teimum at flyta til Suðuroyar á skúlan.



# Loftmiðlarnir verða loystir frá landsstýrinum

*Ikki minst rokið um eykajáttan til SvF, sum fekk stórar avleiðingar fyri Signar á Brúnni, landsstýrismann, hevur víst á trupulleikan í at almennu loftmiðlarnir eru stovnar undir landsstýrinum. Tí skulu ÚF og SvF nú umskipast til almennar fyritøkur*

RÚNAR REISTRUP



Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya eru sum er almennir stovnar undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, men stendur tað til landsstýrið, so skulu teir báðir almennu loftmiðlarnir skjótast gjørligt loysast frá politiska valdinum. Tað skal gerast við at umskipa stovnarnar báðar til almennar fyritøkur.

Hesum tekur stjórin í Sjónvarpi Føroya, Tróndur Djurhuus, ímóti við opnum ørmun.

Ætlanin at gera Útvarpið og Sjónvarpið til almennar fyritøkur hevur sambært landsstýrismanninum við mentamálum, Torbjørni Jacobsen, tvey endamál. Annað er at fáa stovnarnar at virka sum sjálvstøðugir stovnar og leggja greiðar linjur fyri hvør hevur ábyrgdina av rakstrinum. Hitt er at loysa miðlarnar frá politiska myndugleikunum so eingin ivi er um óheftu støðuna, ið miðlarnir hava sum tíðindaberar.

**Skott til politiska valdið**

– Høvdu vit verið eitt sindur meira sjálvstøðugir og havt greiðari formellar linjur, so hevði rokið um játtan til SvF ongantíð uppstaðið.

So bersøgin er sjónvarpsstjórin, Tróndur Djurhuus, sum longu undir arbeiðinum at gera uppskot til løgtingslóg um kringvarp førdi fram, at tað var burturvið at skipa loftmiðlarnar sum almennar stovnar, har stjórin stendur við ábyrgd beinleiðis fyri mentamálaráðharranum. Soleiðis er støðan í dag.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrismanninum skulu Útvarpið og Sjónvarpið stjórnast av nevndum, ið hava bæði programpolitiska og fíggjarliga ábyrgd av fyritøkunum.

Verða stovnarnir skipaðir sum almennar fyritøkur, so fer stjórin í fyritøkuni at hava ábyrgd mótvegis nevndini, sum hevur heimild bæði at seta stjóran „upp á pláss" og at siga hann úr starvi og seta nýggjan, um tað gerst neyðugt.

Á hendan hátt verður eitt skott sett ímillum stovnin og politiska valdið.

**Eykajáttanarmálið skundaði undir**

Sum kunnugt hava viðurskiftini millum sjónvarpsstjóran og táverandi landsstýrismanninum við mentamálum, Signari á Brúnni, fyri stuttum elvt til stórar trupulleikar.

Og núverandi mentamálaráðharrin dylir heldur ikki fyri, at málið um eykajáttanina til Sjónvarp Føroya hevur skunda undir at fáa greiðari viðurskifti í lag millum almennu fjølmiðlarnar og landsstýrið.

Sjónvarpsstjórin er samdur í, at málið um eykajáttanin til Sjónvarp Føroya hevur avdúkað í ríkiligt mát, at brúk er fyri greiðari linjum enn teimum, ið nú galda.

**Ikki alment partafelag**

Tróndur Djurhuus sigur, at í arbeiðinum við at gera uppskot til lógina um kringvarp, ið varð samtykt fyri tveimum árum síðan, skeyt hann upp at kanna møguleikan fyri at gera Sjónvarpið og Útvarpið til almenn partafeløg.

Men so langt er landsstýrið ikki sinnað at ganga.

– Nú er hetta landið so lítið, at tað er neyðugt at man alment tryggjar, at tað altíð verður í hvussu er ein útvarpsrás og ein sjónvarpsrás á føroyskum hondum, og tá haldi eg ikki at tað er ein góð loysn at gera stovnarnar um til alemenn partafeløg, sigur landsstýrismaðurin við mentamálum.

Enn er málið ikki kannað út í æsir, og tað inniber millum annað, at tað enn ikki er greitt, um tað yvir høvur ber til at gera nakað, sum eitur almenn fyritøka, uttan at gera hesa fyritøku til partafelag.

Og vísir tað seg, at hetta ikki ber til, so eru bara tveir møguleikar. Annaðhvørt at lata Útvarpið og Sjónvarpið halda fram sum almennir stovnar, ella at umskipa teir til almenn partafeløg.

Og tá hevði landsstýrismaðurin valt tað seinnu loysnina.

– Broytingar mugu henda, og ber tað ikki til at gera almennar fyritøkur, so er ikki annað at gera enn at gera loftmiðlastovnarnar um til almenn partafeløg, sigur Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður við mentamálum.

# Meiri pengar til Sjónvarp Føroya

*Landsstýrismaðurin við mentamálum, Torbjørn Jacobsen, vil sleppa at geva Sjónvarpi Føroya fleiri pengar at arbeiða við, so føroyska tilfarið á rásini kann gerast meira rúgvumikið*

RÚNAR REISTRUP

Torbjørn Jacobsen er ikki nøgdur við sendiflatuna hjá Sjónvarpi Føroya, og tað skal broytast, soleiðis at Sjónvarp Føroya kann gerast ein verulig mótvekt til tað nógva útlendska tilfarið, sum aðrar sjónvarpsrásir hava at bjóða.

Landsstýrismaðurin við mentamálum ásannar, at tað er ógvuliga torført at fáa eina dygdargóða føroyska sjónvarpsrás at hvíla í sær sjálvum fíggjarliga, og tí verður í løtuni umhugsað at tryggja eitt betri fíggjarligt støði undir stovninum.

– Tað er væl hugsandi at vit fara at taka stig til at tryggja ein nóg stóran føroyskan part av senditíðini við einum almennum ískoyti, sigur Torbjørn Jacobsen, sum tó leggur dent á, at enn hevur hesin spurningurin als ikki verið viðgjørdur, men bert verið havdur í huganum.

Talan verður í slíkum føri ikki um eina játtan á fíggjarlógini, men um ískoyti til ávísar partar av sjónvarpsarbeiðinum.

**Alt ov lítið føroyskt**

Sum er fær Sjónvarp Føroya onga beinleiðis játtan á fíggjarlógini. Ístaðin hevur stovnurin heimild til at krevja inn hyggjaragjald frá øllum, ið eiga sjónvarp, og harumframt sleppur Sjónvarp Føroya at fáa pening inn við lýsingum og eydnuspæli.

Men tað er dýrt at framleiða sjónvarpssendingar, og stovnurin hevur ofta ført fram, at hann hevur ov lítið av pengum at arbeiða fyri.

Sjónvarpshyggjarar hava eisini lagt til merkis, at umframt Dag Viku eru ikki nógvar føroyskar sendingar á skíggjanum. Og síðan stovnurin kom í fíggjarliga kreppu í fjør, er føroyska tilfarið vorðið enn sjáldsamari.

Hetta hevur Torbjørn Jacobsen eisini bitið merki í, og hevur avgjørt at royna at broyta støðuna.

– Mín persónliga hugsan er hon, at tann føroyski parturin av sendingunum hjá Sjónvarpi Føroya er alt ov lítil, og tað ætli eg mær at gera nakað við. Hvat er annars idein við at hava eina føroyska sjónvarpsrás, tá sendingarnar ikki eru føroyskar, spyr Torbjørn Jacobsen, sum í løtuni ikki hevur nakrar ætlanir um eisini at stuðla Útvarpi Føroya á sama hátt.


## Leiðsluskrivari

**Stjórnarskrivstovan**

Til Stjórnarskrivstovuna verður søkt eftir einum leiðsluskrivara. Stjórnarskrivstovan er ein stápur undir stjóranum, sum í fyrsta lagi skal vera leiðsluni til hjálpar, men hevur eisini fleiri umsitingarligar uppgávur fyri alla fyritøkuna, sum er í støðugari menning og broyting. Í løtuni arbeiða fýra fólk á Stjórnarskrivstovuni, sum m.a. hevur ábyrgdina av posti, journal, ávísum fundum, ferðing, vitjanum v.m., og sum er eitt stað, har tað mangan er lívligt – og eisini áhugavert.

**Arbeiðsuppgávur**

- Skrivari hjá nevndini: fyrireika nevndarfundir, samskipa tilfar, skriva fundarfrágreiðing, hava samskifti við nevndarlimirnar og taka sær av aðrari avgreiðslu.
- Skrivari hjá leiðsluni: fyrireika og samskipa leiðslufundir og fundartilfar, skriva fundarfrágreiðing og hava ymiska avgreiðslu um hendi fyri leiðsluna.
- Málsviðgerð
- Aðrar fyrisitingarligar uppgávur á Stjórnarskrivstovuni ella møguliga fyri aðrar deildir, tá tørvur er á tí.

**Førleikar og royndir hjá umsøkjarum**

- Skrivstovuútbúgving ella ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni
- Royndir við tílíkum arbeiði, eins og við vanligum skrivstovu- og umsitingararbeiði
- Góður málkunnleiki, serliga føroysk rættskriving og enskt. Neyðugt er at duga væl at málbera seg
- Teldukunnleiki á brúkarastigi
- At vera røkin og nærlagdur
- Almenn vitan

**Neyðugt er, at tann, ið sett/-ur verður,**

- hevur góð samstarvsevni
- megnar at hava nógv at gera og hava yvirlit yvir fleiri mál í senn
- er vakin og hevur áhuga fyri tí, sum fyriferst í fyritøkuni og í samfelagnum sum heild

Starvið verður lønt eftir førleika og annars sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Tele.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Honnu Simonsen ella Andras Róin á tel. 303030.

Umsóknir við avritum av prógvum v.m. skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. august 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355